# Ísland í tølum

Almenna navnið er Lýðveldið Ísland, sum hevur á leið 300.000 íbúgvar, harav 3,5 prosent eru útlendingar. Høvuðsstaðurin er sum kunnugt Reykjavík við væl meiri enn helmingi av fólkinum. Á leið 183.500 búgva í Reykjavíkarøkinum. Støddin á landinum er 103.200 ferkilometrar. Ovasta formliga valdið hevur forsetin, meðan landið verður stýrt av eini stjórn og einum parlamenti, Altingið, ið hevur 63 limir. Religiónin er evangelisk-lutersk, og 91 prosent av íslendingum eru limir í fólkakirkjuni. Nøkur 100 dyrka norðurlendsku asatrúnna. Høvuðsútflutningurin er framvegis fiskivinnan, ið stendur fyri á leið 60 prosentum av inntøkunum. 35 prosent av fólkinum arbeiða í handil- og tænastuvinnuni, meðan 30 prosent liva av ídnaði og handverki. Ísland hevur seinnu árini bygt upp eina stóra aluminiumsframleiðslu, sum í løtuni stendur fyri á leið 19 prosent av útflutningsinntøkunum. Seinnu árini eru komnar nógvar teldufyritøkur, ið framleiða forrit til telduvinnuna. Ein íslendsk króna skal í løtuni faldast við 16 fyri at fáa eina danska krónu.



*Seinast uppgerð vísir, at tað búgva 300.100 fólk í Íslandi, har av 183.500 í Reykjavíkarøkinum*



















